Ítróttur
e-mail: jakup@sosialurin.fo
Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

Lesi› eisini
Ítróttasosialin
á alnótini
www.sosialurin.fo

Kí helt leingi tørn ímóti Stjørnunum

Kí megna›i at halda máli› reint næstan ein heilan hálvleik, men tapti tó 3-0 ímóti jugoslaviska li›num Rey›u Stjørnu, sum nú óiva fer ví›ari í hesi kappingini

STEFAN Í SKORINI

Klaksvíkingar vóru heilt frá byrjan grei›ir yvir, at hetta fór at vera ein sera torfør uppgáva, og at teir nú skuldu standa sína roynd.

Tí var teirra útgangsstø›i› eisini sera verjukent. Fimm leikarar vóru í verjuni, me›an f‡ra vóru á mi›vøllinum, og ein einsamallur áleypari stríddist har frammi. Tomislav Sivic hev›i allar sínar føstu menn tøkar uttan Kristian á Lakjuni, sum meiddi sær fótin undir venjing sama morgunin, so hann kundi ikki byrja inni, men var› innskiftur í seinna hálvleiki. Rey›a Stjørna spældi vi› eini klassiskari 4-4-2 skipan, sum tó var sera álopskend.

Rey›a Stjørna hev›i taki›

Rey›a Stjørna leg›i hart út og hev›i sín fyrsta málmøguleika longu eftir tríggjar minuttir, so ta› bo›a›i ikki frá gó›um. Verjan hjá KÍ megna›i tó at halda jugoslavunum burtur frá fatinum í gó›ar fjøruti minuttir, sum eisini er eitt megnar avrik í sær sjálvum.

Fimtan minuttir inn í dystin kundi Rey›a Stjørna lættliga lagt seg framum, men skallarin frá Stefanovic enda›i á tvørtræ›num og fór út aftur í spæli›. Løtu seinni leika›i aftur hart á frammanfyri máli› hjá KÍ. Jugoslavar brodera›u seg ígjøgnum verjuna, og ta› enda›i vi› at Ilic gjørdist leysur, men Zoltan kom væl ni›ur og bjarga›i flata skotinum frá landsmanni sínum.

Jugoslavar høvdu fleiri møguleikar, og áleyparin Drulic skuldi eisini skora›, tá i› hann gjørdist fríur vi› Zoltan, man hann koyrdi bóltin ov langt frá sær, í tí hann royndi at fara framvi› málverjanum.

KÍ missir konsentratiónina

Seinastu løtuna av fyrra hálvleiki hev›i KÍ rættuliga gott tak á jugoslavunum,

Ove Nysted og He›in á Lakjuni í hornatøkum vi› jugoslavar

Mynd: Jens Kr. Vang

men ímóti endanum var verjan gapandi opin. Rógvi vinnur eitt fríspark uppi á hinu hálvuni, og her burdu klaksvíkingar hildi› høvdi› kalt ta seinastu løtuna, men eftir frísparki› fóru jugoslavar í skjótálop, og Ilic gerst púra leysur í brotsteiginum. Hesufer› heldur hann høvdi› kalt og spælir yvirum til Drulic, sum bert skuldi rulla bóltin í ta› opna máli›.

Minuttin eftir ver›ur ein langur bóltur sendur ni›an á KÍ-hálvuna. Pacek fær ikki beint bóltin burtur, og endin er, at Jan Andreasen ger brotsspark. Lerinc, sum sigst ver›a besti leikarin hjá Rey›u Stjørnu, sk‡tur, men Zoltan bjargar. Jugoslaviski málverjin hjá KÍ stó› sera væl henda dystin, og hann eigur ein part av æruni fyri, at Rey›a Stjørna ikki fekk fleiri enn tr‡ mál.

KÍ vardi sera djúpt í fyrra hálvleiki, og mangan vóru allir ellivu ni›ri vi› og í brotsteiginum og vardu. Arnold Joensen byrja›i sum framherji, men hann og Ove Nysted b‡ttu pláss í fyrra hálvleiki. Jan Joensen og Rógvi Jacobsen fingu bá›ir gult kort í fyrra hálvleiki, og ta› var møguliga í ordan, men dómarin lat ikki vi› seg koma, tá i› jugoslavarnir tveittu seg ni›ur fyri at fáa fríspark, og hetta eigur at geva gult kort.

Mynd: Jens Kr. Vang

Annars var t‡›uligt, at føroyingarnir ikki vóru vanir at spæla á grasi, tí at teir høvdu ilt vi› at standa á beinunum serliga í fyrra hálvleiki, og hetta darva›i teimum nógv, tí teir mistu næstan altí› eitt fet í mun til teir kviku jugoslavarnar.

Rey›a Stjørna tekur seg aftur

Eftir ste›gin tók Rey›a Stjørna sítt fólk longur aftur á vøllin, og ta› hev›i vi› sær, at KÍ hev›i bóltin meira, men tíverri kom ov sjáldan naka› burturúr teirra álopum.

Rey›a Stjørna økti um lei›sluna mi›skei›is í seinna hálvleiki, tá i› Stefanovic snitta›i bóltin ví›ari í máli›, uttan møguleika hjá Zoltan at bjarga. Tri›ja og seinasta máli› var ein stór verjuvilla. KÍ gevur jugoslavunum bóltin á egnari hálvu, og innskifti Mirkovic gerst so leysur, at honum bert n‡tist at seta fótin á bóltin og beina hann í máli›.

Jan Joensen gekk undan

Li›skiparin hjá KÍ, Jan Joensen, gekk undan í dystinum og stríddist allar 90 minuttirnar. Ta› tóktist, sum var hann allasta›ni á vøllinum og arbeiddi fyri fleiri. Jan Joensen var heldur ikki bangin fyri at halda uppá bóltin og royndi altí› at spæla bóltin frá sær, so at KÍ varveitti bóltin so leingi sum møguligt. Eisini leikti Zoltan sera væl í málinum, og hann fekk seg eisini veruliga royndan av teimum mongu royndunum á máli› frá jugoslavunum.

Annars er at siga, at hetta var eitt sera defensivt KÍ li›, sum leikti á Svangaskar›i mikukvøldi›. He›in og Harley, sum vanliga eru ein t‡›andi partur av álopsspælinum hjá KÍ, lógu so langt afturi, at teir ikki kundu ver›a vi› í álopsspælinum, sum teir plaga. Ta› er tó nærum ógjørligt hjá einum føroyskum li›i at senda fólk ni›an á vøllin, tá i› mótstø›uli›i› er Rey›a Stjørna.

Harley væl nøgdur

Harley Bertholdsen var sum heild væl nøgdur, men sigur eisini, at ta› var sera óheppi›, at Rey›a Stjørna fekk eitt mál beint á›renn hálvleik

STEFAN Í SKORINI

Harley Bertholdsen er ein av teimum garva›ur leikarunum, sum hevur veri› vi› í øllum Europa Cup dystunum hjá KÍ. Hann er vanur at fara fram vi› í álop, tá i› hann spælir vi› KÍ í heimligu kappingini, men ímóti Rey›u Stjørnu var hann sjáldan at síggja á hinari hálvuni.

- Eg eri væl nøgdur vi› dystin og gongdina. Vit kundu valt at fari› longri fram á vøllin og gjørt ta› meira undirhaldandi fyri áskoðararnar, men so hev›i úrsliti› eisini veri› hareftir, sigur Harley.

KÍ var nær vi› at fara til hálvleik vi› stø›uni 0-0, men Rey›a Stjørna skora›i í 43. minutti. Hetta heldur Harley vera sera óheppi›, tí at í seinna hálvleiki tóku jugosvarnir seg longur aftur á vøllin, men hev›i stø›an tá veri› 0-0, hev›i kanska bori› til hjá KÍ at fari› í okkurt skjótálop, av tí at jugoslavarnir høvdu tveitt fleiri fólk longur fram á vøllin.

Harley heldur eisini, at ta› var umrá›andi hjá teimum, at teir ikki vór›u avhølva›ir í fyrra dystinum á heimavølli, tí at teir skulu jú eisini spæla ein útidyst, og tí lógu teir so langt afturi á vøllinum og royndu at halda máli› reint.

- Í seinna dystinum ber kanska til hjá okkum at royna okkurt frameftir vøllinum, men tá ver›ur mótstø›an bæ›i Rey›a Stjørna og tann øgiligi hitin, sum er har ni›ri nú.

Fer›alagi› hjá KÍ fer avsta› leygardagin til Danmarkar og sí›ani ví›ari til Jugoslavia umvegis Budapest mánadagin. Eftir dystin ver›ur fari› á venjingarlegu í heimb‡num hjá venjaranum, Tomislav Sivic, sum fyrireiking til seinnu hálvu av landskappingini.

Jan Joensen stríddist manniliga á mi›vøllinum hjá KÍ. Her roynir hann at fáa bóltin av einum jugoslava, me›an Jan Andreasen hyggur at

Mynd: Jens Kr. Vang

- Tri›ja máli› var ov nógv

STEFAN Í SKORINI

Tri›ja máli› hjá Rey›u Stjørnu kom eftir eitt stórt mistak á KÍ li›num, og tí i›ra›i Sivic seg nógv um ta›.

- Tri›ja máli› var ov nógv. Hatta máli› var sera tápuligt og óney›ugt, sigur venjarin hjá KÍ.

Rey›a Stjørna hevur eitt sera sterkt li›, og tí var Sivic tó nøgdur vi› dystin sum heild.

- Samanumtiki› er hetta í lagi. Vit valdu ein taktikk, sum vit høvdu møguleika fyri at spæla ímóti einum so sterkum li›i sum Zvezda (Rey›a Stjørna blm.).

Sivic hev›i valt ein sera verjukendan taktikk ímóti sínum gamla felag, tí hann visti, hvørjum teir vóru førir fyri.

- Sjálvndi kunnu vit ikki fara at spæla álopsfótbólt ímóti teimum. Vit gjørdu okkara besta, og vit spældu disiplinera›, so ta› eri eg nøgdur vi›, grei›ir Sivic frá.

Tomislav Sivic spældi á unglingali›num hjá Rey›u Stjørnu, og hann seg›i, at ta› er naka› serligt at spæla aftur ímóti sínum gamla felag, men í dag var einki at gera, tí teir vóru bara ov sterkir til okkum.

Sivic hyggur hugsunarsamur at sínum monnum, og hann var sum heild væl nøgdur

Mynd: Jens Kr. Vang

KÍ – Rey›a Stjørna 0-3 (0-1)

44.: 0-1 Goran Drulic
68.: 0-2 Dragan Stefanovic
92.: 0-3 Vladislav Mirkovic

KÍ: Zoltan Kujundic – Andrzej Pacek, Jan Andreasen, Niclas Niclasen, Harley Bertholdsen, He›in á Lakjuni – Jan Joensen(li›s.), Marek Viersbicki, Rógvi Jacobsen(78.Símin Joensen), Arnold Joensen(63.Kristian á Lakjuni) – Ove Nysted(65.Srecko Milicevic)
Gult kort: Rógvi Jacobsen, Jan Joensen, Jan Andreasen

Rey›a Stjørna: Aleksandar Kocic – Marjan Markovic, Stevo Glogovac, Srdjan Bajcetic, Nenad Lalatovic – Ivan Gvozdenovic, Dejan Ilic, Branko Broskovic(78.Jovan Markoski), Leo Lerinc(81.Blaze Georgioski) – Goran Drulic(70.Vladislav Mirkovic), Dragan Stefanovic.